## Sviar kanna CIA-flúgving

Svenska verjan fer nú at kanna upplýsingar um, at fleiri flogfør hjá almennum amerikonskum myndugleikum hava millumlent á svenskum flogvallum. Blaðið Expressen hevur skrivað, at minst eitt av flogførunum hevði fangar hjá CIA. Ovastin fyri lógardeildini hjá svensku verjuni, Stefan Ryding-Berg, skal standa fyri kanningunum, sum skulu staðfesta, um CIA-flogfør við fangum hava millumlent í Svøríki. Sambært Expressen hava flogfør í ørindum fyri CIA millumlent minst tríggjar ferðir á svenskum flogvallum. Stefan Ryding-Berg siger, at svenska verjan hevur upplýsigar um øll flogfør og hvat var í teimum.

## Fleiri fáa fyritíðarpensjón

Talið á dønum, sum fáa fyritíðarpensjón, veksur í hvørjum. Í januar fingu 241.300 fólk fyritíðarpensjón, og tað var 0,3 prosent fleiri enn í januar í fjør, sigur hagstovan í Keypmannahavn. Hagtølini vísa, at tað eru serliga kvinnur, sum noyðast at gevast á arbeiðsmarknaðinum, áðrenn tær røkka pensjónsladri. Av teimum 241.300, sum fingu fyritíðarpensjón í januar, vóru 131.200 kvinnur. Hagstovan sigur, at 7,1 prosent av øllum dønum millum 18 og 64 ára aldur eru nú fyritíðarpensjonistar. Lutfalsliga eru teir flestu á Bornholm og teir fægstu í Keypmannahavn.

# Góðar 40 milliónir til Skálafjarðarveg

**Í dag er nýggj vegaføring í Skálafirði á skrá í tinginum. Vegurin oman fyri bygdina skal kosta einar 43 milliónir krónur, og verður eftir ætlan liðugur um eini tvey ár**

VEGAFØRING

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Landsverk fer, eftir øllum at døma, í næstum at gera smáar tríggjar kilometrar av vegi omanfyri Skálafjørð. Til 2. viðgerð atkvøddu 21 tingfólk fyri uppskotinum at nútímansgera vegin, soleiðis, at ferðslan ikki longur skal verða førd gjøgnum bygdina.

Rættarnevndin hevur eisini havt uppskotið til viðgerðar, og tað var stórur meiriluti at samtykkja uppskotið. Bara Bjørt Samuelsen úr Tjóðveldi var ímóti. Hon er tó sannførd um, at tað er ein ætlan, ið skal gerast, men hon hevur prinsippiella støðu viðvíkjandi íløgum hjá landinum, og kann ikki góðtaka, at hesin vegur verður gjørdur beint nú. Tá uppskotið var fyri til 2. viðgerð atkvøddi hon tó blankt, saman við Bergtóru Joensen og Sjúrði Skaale. Bara Kári á Rógvi atkvøddi ímóti.

Heili 21 tingfólk vóru fyri uppskotinum, sum eftir ætlan skal kosta undir 44 milliónir krónur, tá vegaføringin er liðug um tvey ár, sum lagt verður upp til.

Høvuðsorsøkin til uppskotið er, at verandi vegur er smalur og gongur millum hús. Tí metir innlendismálaráðið ikki, at vegurin er hóskandi sum landsvegur.

Sambært uppskotin skal tað í framtíðini eisini vera soleiðis, at kommunan yvirtekur vegin, og skal taka sær av viðlíkahaldinum.



*Tá hesin vegurin er liðugur, skal hann í mesta lagi kosta 43,5 milliónir krónur*

### Sjálvsstýrið ímóti

Hóast vegurin omanfyri Skálafjørð er eitt hjartamál hjá Sjálvsstýrisflokkinum, so hava teir atkvøtt ímóti uppskotinum, og fara eisini at gera tað í morgin.

- Vit vilja ikki samtykkja nakra íløgu, fyrr enn vit vita, hvørjir pengar eru, sigur Kári á Rógvi, sum var einasti tingmaður at atkvøða ímóti til 2. viðgerð. Kári P. Højgaard var burturstaddur.

- Er tað pensjónistar ella mentan, so er ongin uppbakningur, men er tað ein vegur, so ber alt til. Tað vísir seg, at mann bara játtar fyri at játta, og eg ivist ikki í, at vit fara at síggja ein øgiligan sorgaleik í heyst, tá ongir pengar eru til nakra íløgu, sigur Kári á Rógvi.

-eij

# Miðnámsnæmingar í leysari luft

**Komandi miðnámsskúlanæmingar eiga at fáa boð hósdagin, um tey sleppa í skúla. Soleiðis verður ikki, tí peningur vantar. – Um miðjan mai skuldu komandi næmingarnir fingið boð, tí tá verður eykafíggjarlógin klár, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna**

MIÐNÁM

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Eftir røttum skuldu allir næmingar, ið hava søkt inn á miðnámsskúlar fingið boð hósdagin, um tey eru sloppin inn. Men soleiðis verður ikki, tí skúlarnir hava onki svar fingið frá Mentamálaráðnum. Tó skulu allir skikkaðir næmingar sleppa á miðnámsskúla.

- Ætlanin er, at allir skikkaðir næmingar sleppa undir miðnámsútbúgving, og eg haldi ikki tey skulu verða bangin um, at tey ikki sleppa inn, sigur Helena Dam á Neystabø. Hon leggur tú afturat, at tað væl kann henda, at summir næmingar ikki fáa sín fyrsta prioritet. Men hetta hevur verið vanligt seinastu árini.

### Gongur longri

Sum er vita næmingar ikki, um teir eru keyptir ella seldir, og í veruleikanum skuldu teir fingið boð í ovurmorgin, men soleiðis verður ikki.

- Tað gongur nokk eitt sindur longri hesaferð, men tingið fer heim um miðjan mai, og tá skuldi eykafíggjarlógin verið avgreidd, og næmingarnir fingið boð. Hetta kann tó merkja, at summar reguleringar verða gjørdar í flokkum, men ongin flokkur verður størri enn lógarkravið er, sigur Helena Dam á Neystabø.

## Havnarkórið várkonsert í Vestmanna Kirkju

VÁKONSERT

Eins og helst øll virkin kór í landinum endar eisini Havnarkórið kórárið 2008/2009 við várkonsertum. Tann fyrsta verður í Vestmanna Kirkju nú hóskvøldið 30. apríl kl. 20.00.

Lagt verður fyri við teimum trimum førisku sálmunum "Kom, friður av himni" (lag: Knút Olsen), "Jarðareyga" (lag: Kári Bæk) og "Gakk tú tryggur" (lag: Jógvan á Lakjuni). Tínæst fylgja fýra norðurlendskir kórsatsir, og fyrra helvtin av skránni endar við føriskari heildarfrumframførslu av tí gitna opus 104 eftir Johannes Brahms, sum fevnir um teir 5 kórsatsirnar "Nachtwache I", "Nachtwache II", "Letztes Glück", "Verlorene Jugend" og "Im Herbst".

Eftir prestaorð av kórsgáttini verður kvinnukórið at hoyra við fýra vár- og summarkendum satsum á týskum og enskum máli, og blandaða kórið heldur síðan fram á hesari leið við vælljómandi enskum madrigali, kendum írskum fólkasangi og spræknum amerikanskum negro spiritual: "Ain´–a that good news!".

Eins og byrjað verður eisini endað á føriskum: Gitna yrkingin "Náttarfriður" eftir Goethe og J.H.O.Djurhuus í kórbúna eftir Vagn Holmboe, hvørs 100-ára føðiár er í ár, og seinasta ljóðið frá kórinum verður kendi kvøldsálmurin "Dagsins eyga sloknar nú" við tí vakra lagnum hjá Knúti Olsen.

### Føroyskt Bretskt Felag havt aðalfund

Føroyskt Bretskt Felag hevur havt aðalfund, og í nevndini sita Merry Stenberg, Eyrith Guttesen Leyni, Fanny Joensen, Anna Christiansen og Lisabeth Restorff. Tær í nevndini heilsa og sig, at nýggir limir kunnu tekna seg hjá einum av nevndarlimunum.